# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*

# Dagstovnurin á Oyrarbakka

**Dagstovnurin á Flatunum lat upp í august í 2005, og er ein sera stórur stovnur**

**BØRN**
*Steintóra Joensen*
*Myndir: Jens Kristian Vang*



Stovnurin sum liggur á Oyrabakka, fevnir um 86 børn, har tey flestu eru úr Sunda kommunu - t.v.s Norðskála, Oyri og Oyrarbakka.

Tað eru seks stovur, har tvær eru vøggustovur, tvær barnagarðsstovur og tvær frítíðarstovur. Í frítíðarstovunum hava tey 1., 2. og 3. flokk. 1. og 2. flokkur eru í einari stovu, meðan 3. flokkur er fyri seg sjálvan. Dagstovnurin á Flatunum er eisini tann einasti í Føroyum, ið hevur 3. flokk.

Av og á, um vikuskiftið plaga tey eldru børnini sum ganga har, at yvirnátta eina nátt á stovninum, har tey spæla og hugna sær saman við onkrum av starvsfólkunum.

Á stovninum starvast millum 20-25 fólk, harav bert eitt mannfólk.

Børnini hava altíð úr at gera. Einaferð um vikuna fara tey í fimleikahøllina. Av og á fara tey á bókasavnið, og tá veðrið er til vildar eru tey úti. Um ikki, hugna tey sær inni við perlum, bóltspæli o.ø.

Stovnurin letur longu upp klokkan 07:15, og sum eitt at starvsfólkunum tók til:
- Børnini dáma so væl, at tey ikki vilja heim aftur, tá dagurin er av!



*Birita situr við guittaranum og spælir fyri Gunnari, sum so hugaligur situr við ítrivi sínum*




*Djór hava stóran áhuga hjá børnum. Í einum horni hava Tove, Lív og Brynja innrættað sær ein djóragarð*



*Eitt spennandi spæl er bobb. Turið spælir móti einum av starvsfólkunum. Vinnur hon ikki í dag, kann tað verða seinni*



*Sigur Jón hevur latið seg í til heiðurs fyri myndamannin*